# Føroyameistarar í hondbólti 2006

## Kyndil nógv bestir hjá monnunum

Hjá monnunum var bert neyðugt við tveimum finalum fyri at finna vinnaran av Atlantic Airways-kappingini. Eftir ein tryggan sigur á VÍF í Vestmanna, gjørdi Kyndil bart í seinnu finaluni í Havn og vann stórsigur, 36-22, og harvið vunnu teir samanlagt ein greiðan FM-sigur framman fyri eini stúgvandi fullari ítróttarhøll á Hálsi.




*Kyndil – føroyameistari í manshondbólti 2006. Standandi frá vinstru: Rúni Johansen, Bárður Dal-Christiansen, Kári Nielsen, venjari, Zeljko Hornjak, Hans Arni Thomsen, Høgni Klein, Hanus Johansen, Lars L. Black, Hjalti M. Jacobsen, Pól Rói Mohr, Gunnar Wardum, Ken Zachariassen, Birgir Hansen, venjari og Jan Bendtsen, liðleiðari.*
*Húkandi frá vinstru: Pætur Johansen, Rókur Akralíð, Hannis Wardum, Ragnar Stakksund, Janus Einar Sørensen, Hans Áki Dal-Christiansen, liðskipari, Rani Ellingsgaard, Johan Danielsen, Josef Abrahamsen, Regin Fossaberg og Jónleif Sólsker.*
*Mynd: Álvur Haraldsen*




## Stjørnan vann hjá kvinnunum

Stjørnan og Neistin spældu tríggjar spennandi og dramatiskar finalur í Sunset-kappingini. Finalurnar høvdu alt, sum slíkar skulu hava. Spennandi og tættir dystir á vøllinum, eitt sindur av roki rundan um, og so ein vinnari til endans.

Neistin vann fyrsta dystin við einum máli, men síðani vann Stjørnan næsta dystin við fleiri málum. Alt skuldi tí gerast av við einum triðja og seinasta finaludysti í Havn. Her hevði Stjørnan aftur munin, og so kundi Klaksvíkskvinnur fáa gullmerkini um hálsin.

*Stjørnan føroyameistari í kvinnuhondbólti 2006. Aftan frá vinstru: Diana Poulsen, Shari Mikkelsen, Jógvan Leivur Nolsøe, hjálparvenjari, Annika Biskopstø, Maria við Neyst, Louisa Andreasen, Durita Mikkelsen, Anna Kristina Samson, Bára S. Klakstein, Joan M. Djordjevic, Una Olsen, Lazar Kurdic, venjari.*
*Framman frá Edith Hansen, Alina Olaru, Rannvá Andreasen, Ange Masenaite, Durita Christoffersen, Katharina Stepanjov.*
*Mynd: Álvur Haraldsen*


## FINNIÐ BÓLTIN

Saman við Atlantic Airways lutar Sosialurin í ár ikki færri enn 13 flogferðaseðlar á rutunetinum hjá Atlantic. Ein vinnari verður hvørt umfarið í Formula-deildini

Møguleikarnir fyri flogferðum úr Føroyum hava ongan tíð verið so stórir, sum teir verða tað í ár. Við fimm flogførum í støðugari flúgving eigur Atlantic Airways sín stóra lut í øktu valmøguleikunum, og nú kanst tú saman við Sosialinum og Atlantic verða partur í nøkrum av mongu fráferðunum.

Eftir hvørt umfarið í Formula-deildini verður ein mynd at síggja her í blaðnum, har vit hava »sletta« bóltin úr myndini. Uppgávan hjá lesaranum er so at gita, hvar hesin bólturin eigur at vera.

Við at senda SMS-boð á 1441 ber til hjá lesarunum at vera við í kappingini, har Atlantic Airways hevur eina flogferð tøka eftir annaðhvørt av teimum 27 umførunum í Formula-deildini.

Heldur tú, at bólturin er í teigi 1, skal teksturin í SMS-boðnum vera »hvar 1«. Soleiðis skal hvørt boðið bara innihalda orðið »hvar« og so nummarið á teiginum, har tú heldur bólturin eigur at vera.

*Kostnaðurin fyri at senda boðini er 5 krónur umframt vanligan SMS-takst.*

ATLANTIC AIRWAYS






**Hvar er bólturin?**

Hvar heldur tú, at bólturin er? Við at senda eini SMS-boð til 1441 kanst tú vera við í lutakastinum um eina ferð á rutunetinum hjá Atlantic Airways. Skrivað hvar og so nummarið á teiginum, har tú heldur bóltin vera.